# Hoydal: Laksáfoss koppaður runt

**Formaðurin í Tjóðveldinum rósar ikki fíggjarlógaruppskotinum, sum varð lagt fram fríggjadagin. Størsti útreiðsluvøkstur í Føroya søgu kallar Høgni Hoydal semjuna hjá samgonguni**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*- Við semjuni um fíggjarlógaruppskotið hevur samgongan lagt upp til størsta útreiðsluvøkstur í Føroya søgu, heldur formaðurin í Tjóðveldinum, Høgni Hoydal*

*Savnsmynd*

Semjan um fíggjarlógaruppskotið fyri komandi ár fær ikki rósandi orð frá andstøðuni. Sum formaður í Tjóðveldinum finst Høgni Hoydal ikki óvvæntað at semjuni hjá samgonguni um komandi fíggjarlóg, ið Magni Laksáfoss legði fram fríggjadagin.

- 335 milliónir krónur kostarsonevnda fíggjarlógarsemjan landskassanum. Minst. Bæði skattalætti og størsti útreiðsluvøkstur nakrantíð í Føroya søgu. Nú má ábyrgdarloysið støðgast, skrivar Høgni Hoydal í viðmerking í blaðnum í dag.

Víðari skrivar formaðurin í Tjóðveldinum:

- So fór seinasta bardunin í búskapinum.

»Bardunin«, sum Høgni Hoydak sipar til, er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Magni Laksáfoss.

- Sjáldan er nakar vorðin so illa viðfarin og koppaður so runt, sum fíggjarmálaráðharrin, tá hann nú fekk sín umgang í samgongukarrusellini. Eftir alt tos og meldingar um at tálma búskapin og støðga skattalættum, gjørdist úrslitið beint øvugt: Útreiðslurnar á fíggjarlógini næsta ár skulu hækka við 255 mió. kr. Hetta er størsti vøksturin nakrantíð í Føroya søgu, og tað kann bert hita búskapin enn meira, og setur spidaran í botn, skrivar Høgni Hoydal og heldur áfram:

- Skattalættin fyri 2008 verður framvegis 70 mió. kr. fyri landskassan og einar 10 milliónir krónur fyri kommunurnar. Tað er væl meira, enn avtalað varð í samgonguskjalinum og nett tað sama krónutalið, sum Bárður Nielsen upplýsti, tá skattalættin varð samtyktur. At so ein øking orsakað av metingum um búskaparvøkstrinum, broytir onki. Framvegis er talan um 70-80 mió. kr. fyri 2008, sum er tað talið, ið tingið higartil hevur fingið upplýst.

### Fyri Løgtingið týsdagin

Høgni Hoydal heldur, at skuldi samgongan ikki slitna, noyddist fíggjarmálaráðharrin at sleppa øllum og finna eina forkláring.

- Hann noyddist at royna at bluffa pressuna og almenningin til tess at fjala hetta ótruliga ábyrgdarloysi, sum onnur hava lagt á hansara herðar. Og tí tosar hann nú um eina tálming í mun til ein mettan búskaparvøkstur í 2008.

Síðst í innleggium staðfestir Høgni Hoydal:

- Neyvan verður nøkur fíggjarlóg samtykt yvirhøvur, áðrenn valið skal útskrivast, men skattalættin stendur eftir. Verður hetta ábyrgdarleysa spælið ikki støðgað sum skjótast og vit fáa eina aðra samgongu, so verður Laksáfoss ikki tann einasti, ið liggur eftirá. Tað ger hinvegin føroyski búskapurin, og ætlanirnar um at skipa ein sjálvberandi og óheftan búskap, skrivar Høgni Hoydal.

Fíggjarlógaruppskotið verður lagt fyri Løgtingið í morgin.

